TAKS



**Tollur – tað er ikki bara sum at siga tað!**
**Posttollurin leitar eftir fólki**
Umsóknarfreistin er 25. juli 2008 kl. 12.00
WWW.TAKS.FO



# Cand.office

City Tórshavn søkir eftir skrivstovufólki at byrja sum skjótast.

***Starvið***
Starvið fevnir um telefonavgreiðslu, ordramóttøku, bíleggingar, umsiting av vøruskrá og nethandli umframt annað fyrifallandi arbeiði í hesum sambandi.

Talan er um avloysarastarv, í fyrsta umfari til 1. august 2009. Arbeiðsvikan er 40 tímar, og lønin verður sambært avtalu.

***Yrkisførleikar***
Vit vænta, at tú hevur royndir og helst útbúgving í skrivstovu- og/ella handilsyrkinum. Hollur telduførleiki er ein fyritreyt.

***Eginførleikar***
Tú ert fyrikomandi og skyldurøkin, sýnir tænastusinni, áræði og ábyrgd, og tú arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum.

***Umsóknir***
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan fríggjadagin 25. juli og kunnu stílast til Nema, HR-deildin, Postmoga 109, 110 Tórshavn ella við teldubrævi til hrdeildin@nema.fo.

***Meira at vita***
Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Tonny Brimsvík á tlf. 794 314 ella á tbr@city.fo.

*City er partur av Nema-samtakinum og er skrivstovumarknaður við einum breiðum úrvali av teldu- og skrivstovuútbúnaði til bæði arbeiðsplássið, skúlanæmingin og húskið.*

*City hevur deildir í Tórshavn, Klaksvík og Saltangará, umframt at vit bjóða eina útkoyringartænastu, sum tryggjar, at kundin hevur vøruna í seinasta lagi dagin eftir bílegging.*

NEMA

city
www.city.fo

SENDISTOVAN

# Hevur tú eitt miðlafólk í búkinum?

Starvslýsing: Journalistur til Miðlahúsið




Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2. Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

Kom og hjálp okkum at menna Rás2, Sosialin og Portalin. Í Miðlahúsinum í Vágsbotni vilja vit støðugt styrkja okkum til avbjóðingarnar í einum livandi fjølmiðlaheimi.

Síðani oktober í fjør hevur Rás2 verið partur av okkara samtaki, sum er í støðugari menning. Nú sóknast vit eftir fólki at styrkja um tíðinda- og aktualitets partin á redaktiónini, fyrst og fremst á Rás2.

Sum partur av Miðlahúsinum fært tú møguleikan at virka í einum livandi og dynamiskum fjølmiðlaumhvørvi, har vit í felag royna at gagnnýta styrkir og møguleikar hjá okkara miðlum. So hevur tú hug til tíðindaheimin? Nøs fyri eini góðari søgu? Hevur tú hug og evni, bæði at arbeiða sjálvstøðugt og tætt saman við øðrum. Og dámar tær avbjóðingar? So lat okkum frætta frá tær!

Útbúgving og/ella royndir innan fjølmiðlaøkið eru absolutt fyrimunir, men tó ikki treytir.

Tú byrjar í starvi hjá okkum skjótast tilber, men helst ikki seinni enn 1. august.

Tú fræítir meira um starvið við at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, á telefon 341800. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo

Merkið brævbjálvan »umsókn« og sendið hesa í seinasta lagi 15. juli til:

**P/F Miðlavarpið**
**Postsmoga 76**
**FO-110 Tórshavn**

Sosialurin
miðlahúsið í Vágsbotni